## DAGSINS MEINING

# Kvinnur í politikki

Í vikuni, sum fór, var ráðstevna um luttøku kvinnanna í politikki. Ráðstevnan var íkomin eftir avgerð hjá Útnorðursráðnum. Ein meginspurningurin á ráðstevnuni var, hví ikki fleiri kvinnur eru uppi í politikki. Ljós varð varpað á føroysku politisku skipanina, har tað sum kunnugt er smátt við javnstøðu. Hví verða so fáa kvinnur upptillaðar, og hví verða so fáa valdar?

Vit kenna enn ikki sjálvar niðurstøðurnar frá ráðstevnuni, so vit fáa ikki ítøkiliga gjørt viðmerkingar til úrslitið av ráðstevnuni. Tað tykist tó greitt, at ein valskipan við einum valdømi tykist geva kvinnunum størri møguleikar at gerast tingfólk. Hetta er áhugavert og er enn ein góð grund til at fara burtur frá tí avoldaðu skipanini við sjey valdømum í hesum lítla landi. Tað er lítil ivi um, at ein broytt skipan við einum valdømi og hóskandi tali av eykalimum, hevði givið eitt nógv virkisførari løgting.

Men her eru ivaleyst aðrar orsøkir til, at so fáar kvinnur sita á tingi. Leitast má eftir hesum orsøkum á fleiri støðum og fyrst og fremst hjá politisku flokkunum. Her er tørvur á sjálvsrannsakan. Tað er eygsæð frá einum demokratiskum sjónarmiði, at fleiri kvinnur eiga at vera í politikki og tá fyrst og fremst í løgtingi. Men tørvur er eisini á fleiri kvinnum í bý- og bygdaráðum. Kvinnur eru sum kunnugt helvtin av mannaættini, og tí er tað í sjálvum sær óheppið og ódemokratiskt, at kynsbýtið er so skeivt, sum tað er í dag.

Hvussu loysa vit so henda trupulleika? Tað hevur verið borið upp á mál at áseta eina ávísa kynskvotering í vallógina. Vallógin skal skipast so, at uttan mun til valúrslitið skulu eini 40-50% av tinglimunum vera kvinnur. Hetta er óvanligt, men ikki heilt ókent. Hetta er avgjørt ein gongd leið, men hon hevur tann vansa, at kvinnur tá verða valdar, tí tær eru kvinnur og ikki tí at tær umboða eina politiska hugsjón. Er hetta ynskiligt? Ein minni ógvuslig kvotering kundi verið, at tað í vallógina varð ásett, at á hvørjum vallista skulu í minsta lagi 40-50% av valevnunum vera kvinnur. Hetta hevði verið ein skilagóð millumloysn. Tað besta fyri allar partar hevði tó verið, at politisku flokkarnir viðurkendu sína ábyrgd mótvegis javnstøðuhugsjónini og alt fyri eitt fóru undir eitt seriøst og miðvíst virksemi til tess at rekruttera kvinnur til tað politiska arbeiðið. Hetta vildi verið tann mest demokratiska loysnin og ivaleyst tann loyst, sum í longdini vildi verið tann haldbesta loysnin.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Einligar mammur móti sjey landsstýrismonnum

**Annita á Fríðriksmørk**
*framsøgukvinna Tjóðveldisfloksins í javnstøðumálum*



Landsstýrismaðurin í almanna og heilsumálum Hans Pauli Strøm hevur fleiri ferðir í farnu viku sagt, at ráð eru ikki til at geva einligum mammum ein lætta, nú landskassans inntøkur síggja út til at minka. Tær kunnu bíðja til ráðini verða betur, og tá kunnu tær vænta sær eina íbúðartrygging og ein barnakekk, sigur altso landsstýrismaðurin.

Nøkulunda somu lagnu fekk barsilsskipanin í vár frá sitandi samgongu. Tá pengar vantaðu í, var barsilsskipanin tað fyrsta samgongumenn fóru eftir.

Men tá ið landsstýrið ikki sær seg ført fyri at geva einligum mammum eina hjálpandi hond, og tá ið barsilsskipanin má spara, kundi verið áhugavert at hugt at, hvat landsstýrið so heldur seg hava ráð til:

- Almennan stuðul til rækjuvinnuna. Tað teir rópa fyri skattaafturbering
- Økja um almennu fyrisitingina við m.ø. einum kunningarráðgeva, sum skal greiða fólki frá, hvat landsstýrið meinar við.
- Eina ómotiveraða avtøku av punktgjøldum á hvítvørum, -ein príslækking, sum eftir stutta tíð hevur etið seg uppaftur til ta upphædd, sum brúkarin er sinnaður at rinda. Tvs til somu upphædd, sum í dag!
- 240 mió kr í skattalætta, sum verður deilt soleiðis millum lønmóttakararnar, at jú meira tú forvinnur, jú meira fært tú í lætta.

Og tá skattalættin hjá samgonguni verður nevndur sum dømi, er vert at bíta merki í, at einligar mammur sjáldan liggja í hægra endanum millum lønmóttakarar. Ítøkiliga semjan um skattalættan hjá samgonguni vil geva eini einligari mammu, sum til dømis

- forvinnur 180.000 kr árliga (t.v.s. 15 túsund krónir mánaðarliga) ein lætta, sum kemur at liggja um knappar 4.000 kr árliga.
- Forvinnur hon 240.000 krónir árliga (t.v.s 20 túsund um mánaðin) fær hon ein lætta á 12.000 kr. árliga.
- Til samanberingar fara øll løgtingsfólk at fáa ein lætta á 25.000 krónir árliga
- Meðan allir landstýrismenninir hvør í sínum lagi fara at fáa 35.000 krónir árliga í skattalætta

Hesi tøl tala fyri seg sjálvi, og geva eina týðilga ábending um, hvussu sitandi samgongumenn raðfesta, nú teir siga seg ikki hava ráð til at hjálpa einligum mammum.

Eisini er vert at leggja sær í geyma, at skattalættin, sum einligar mammur fáa ikki kann leggjast afturat lættanum, sum makin fær. Tað kann skattalættin hjá landsstýrismonnunum hinvegin - og okkum ørum, sum hava ein maka.

Hóast hetta rindar tann einliga mamman líka nógv sum hjún ella pør tilsamans rinda fyri sjónvarpsgjald, útvarpsgjald, trygging og aðrar fastar útreiðslur, sum húskið hevur.

Tað, sum sermerkir hesi øki, sum samgongan raðfestir so niðarlaga,- einligar mammur og barsilsskipanin, - er, at hesi øki, sum verða niðurprioriterað, eru í høvuðsheitum mannað við kvinnuligum lønmóttakarum.

Hetta er tí eitt dømi um, hvussu umráðandi tað er, at bæði kynini eru umboðaði har politiskar avgerðir verða tiknar. Hugsið tykkum um t.d. umleið helvtin av samgonguni og helvtin av landsstýrinum vóru kvinnur og hin helvtin menn. Halda tit so, at verandi raðfesting av landsins ognin hevði gliðið so lætt niðurum hjá politiska meirilutanum. Neyvan!

Harvið er ikki sagt, at allir menn raðfesta sum sitandi samgongumenn, og at allar kvinnur eru ímóti,- raðfestingin er hinvegin týpisk fyri fólkafloksteori og javnaðarpraksis. Men við samstarvi millum bæði kynini hevði viðgerðin verið heilt øðrvísi. Hesi hava jú hvør sína bakgrund, og harvið hvør sín vinkul og sjónarmið til tey ymisku viðurskiftini í samfelagnum.

Soleiðis høvdu sjónarmiðini hjá einum nógv breiðari skara av fólki fingið innivist í politisku viðgerðini og avgerðini.

Tað hevði tænt fólkaræðinum!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Ódugnaligur fakfelagsleiðari ella villleidd tíðindafólk

**Kim Hansen**
*Keypmannahavn*

Flestu búskaparfrøðingar er samdir um at fiskimannaskattaavslátturin er skaðiligur fyri føroyska búskapin og harvið okkara vælferð. Ein av teimum segði í summar, at hesin avsláttur gagnar ódugnaligum fakfelagsleiðarum. Eitt dømi er formaðurin í Fiskimannafelagnum, ið sleppur undan at stríðast við rætta mótpartin.

Hyggur ein at sáttmálanum hjá fiskimonnunum, so er hettar ein sáttmáli, ið hoyrir slupptíðini til. Vánaliga pensjón, sammett við aðrar arbeiðsbólkar. Løntir við býtisprosenti, ið best gagnar reiðarunum. Kunnu verða kravdir at verða burtur í 4 mánaðir ella longur, alt eftir hvat reiðarin finnur fyri gott. Eiga tímaløn fyri ymiskt arbeiði tá teir eru burtur, men seinast eg visti, fingu fleiri teirra ikki hesa løn, við vælsignilsi frá Fiskimannafelagsformanninum.

Fleiri onnur dømir eru helst eisini, og verður sammett við grannalond okkara, so er ongin ivi um at Fiskimannafelagsformaðurin hevur sovið í fleiri ár. Reiðarar hava lætt spæl, og fiskimaðurin verður snýttur. Hettar letur seg gera, tí politikkarin velur at geva skattalætta til fiskimannin.

Ein kann síðan spyrja seg sjálvan, um hesin formaður hevur uppiborið slíkt rós, hann fær í oddagreinini hjá Sosialinum 26. aug. 2004, fyri at stríðast ímóti skeivum mótparti.

Nógv bleiv fyrr í ár sagt um fiskimannaskattaavslátturin, m.a. var sagt, at hann ávirkaði vøksturin á lønarlagnum. Hettar bleiv afturvíst av Fiskimannafelagsformanninum. Hann slapp við at siga, at býtisprosentið var voksið síðan skattaavslátturin kom. Ikki eitt tíðindafólk fór út og kannaði, um hesin vøkstur var stórur ella lítil. Kann nevna at býtisprosentið fyri rækjubátarnar var 28% fyri 12 árum síðani, tá eg var við rækjubáti, og í dag er tað 27%. Er tað tí rækjuflotin er í kreppu í dag?

Høvdu tíðindafólk verið líka røsk til at eftirkanna póstandir hjá Fiskimannafelagsformanninum, sum at róst honum, so var kjakið um skattaavslátturin helst komið longur enn um øvund inná fiskimannin. Ístaðin fyri at brúka fornemmasta pláss í Sosialinum til at rósa Fiskimannafelagsformanninum, fyri at berjast ímóti TV2, um ósannindir um fiskimannaskattaavslátturin, skuldi Sosialurin heldur valt at lýst málið, og tað sum hevur veruliga týdning: Hvørjum gagnar skattaavslátturin til fiskimenn? Gagnar hann vinnuni, okkara búskapi, okkara vælferð? Og eru nøkur skaðilig árin?

# Almenningurin Arvafíggindar í Føroyum?

**Hans Birgir Hansen**



Eg havi nátt fleiri av mínum endamálum, at gerast meira fríur, frælsur, við rættindum og privatlívsfriði og kunna skipað meg sjálvstøðugan og sjálvstøðugt vinnurekandi í Havnini. Eg havi goldið nógv fyri at náa hesum endamálum og havi dagliga ligið undir nógvum fyribrigdum og trúartrýsti, undir skiftandi viðurskiftum og umstøðum og misti fleiri forrætningsavtalur, viðskiftafólk við atliti samskifti og samstarv ídag!

Eg havi dagliga møtt nógvum forðingum, kreppum, trupulleikum á vegnum, tað almenna, privata, land, kommuna, ríkið og almenningurin, skaptu mær, í Tórshavn/Suðurstreymoy!

Eg havi síðani aftaná eina røð av almennum avdúkingum, uppliva dagliga ignoreran og at persónsterror og telefonchikanu, er stagnera í løtuni og eg havi ikki fingið stevnt øllum!

Eg havi nógv jørn í eldinum og gekk undan í ungdóms- og frítíðarlóggávu, & fur, í sjeytiárunum og áttatiárunum, almennar, privatar, skráir og skrásetingareftirlitið og Tey Grønu!

Eg havi í nýtiárunum skapt fríari rúsdrekkasølu og altjóða arbeiðsskapandi verkætlan og fólkaheilsan, ið hevur verið umrøtt í føroysku dagbløðunum og eri eg stak væl nøgdur!

Eg havi altíð liva og virka eitt strævið, tungt og ómenniskjansligt lív og havi nátt góðum úrslitum, við hjálp av kosttilskoti og náttúruheilivági, tá ein fær ymiskar kurir í dag!

Eg havi nógv viðhaldsfólk, ið stuðla mær moralskt og eg havi í gjøgnum árini, skapt eitt sínamillum sjálvsálit og hvørs viðhaldsfólk kenna meg pesónliga og eg kenni tey í dag.

Eg havi ikki havt lætt við at vera føroyingur; tá ið ein einsamallur bleiv settur upp ímóti teimum ráðandi kreftunum og myndugleikar og valdir, ið hava skipað fyri áðurnevnda!

Eg havi við teimum túsundstals lesarabrøvum, í bløðunum fingið gjørt heildarmyndina og heildarstøðuna greiðar so blaðlesarar kunnu síggja samanhangandi lívsviðurskiftini!

Eg havi fingið givið øllum innliti, forstáilsi, tilvitan, til tann dulda heimin, og hvussu alt verður skipað, aftan fyri ryggin á arbeiðandi fólki, tikin av ræði í egnum lívsviðurskifti!

Eg havi sæð hvørja ávirkan ið lesarabrøv hava tá míni sjónarmið vera tikin alment og politiskt og fakliga upp til viðgerðar, ið skapar nógv kjak úti ímillum manna kring alt landið!

Eg havi eisini víst á, hvussu samfelagið, fjøldin av einstøkum, eiga at skipa seg og síni egnu lívsviðurskifti og áhugamál, privatlív, uttan óviðkomandi uppíleggjanir uttanífrá.

Eg havi nógv at fylgja upp í øllum tí ein hevur viðgjørt í teimum túsundtals lesarabrøvum, kjakevnir, viðurskiftir ið hevur mín samfelags áhuga og fremja hjálp til sjálvhjálp!

Eg havi lívsins harða skúla og tess lívsavbjóðingar at byggja lívserfaringar/-royndir á, og eg nýti bert bløðini at skapa alment innlit, forstáilsi, tilvitan, til tað ein viðgerð.

Eg havi fyrireika meg til framhaldandi at stríðast við almenningar, arvafíggindar, avbygdar-, býar-, havnarfólk, útlendingar, ið fremja eina røð av lógar og rættarbrotum v.m.


# HALDIÐ SOSIALIN



**450,-** um ársfjórðingin
- sparið **395,-**
í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800
FAX 341801 · POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn:
Bústaður:
Postnr.:
Bygd/býur:
Telefon nr.:
Undirskrift: